JARÐFRØÐISAVNIÐ
Faroese Geological Survey

## Søkt verður eftir:

# Jarðfrøðingi / Jarðalisfrøðingi

## – avloysarastarv á Jarðfrøðisavninum

Vegna barnsburðarfarloyvi er eitt tíðaravmarkað starv sum jarðfrøðingur/jarðalisfrøðingur á Jarðfrøðisavninum leyst at seta frá 1. marts 2004 ella skjótast til ber.

**Starvið**
Jarðfrøðisavnið skipar fyri kanningararbeiðnum viðvíkjandi møguligum landgrunnskrøvum uttan fyri 200 fjórðingamarkið. Hetta arbeiði fór veruliga í gongd á vári 2003 í tøttum samstarvi við danska kanningarstovnin GEUS. Viðkomandi kemur at arbeiða í einum fjøltáttaðum og tvørfakligum umhvørvi við sambandi til heimligar og útlendskar myndugleikar og kanningarstovur. Uppgávur fevna eitt nú um innsavning og tulking av seismiskum og geokemiskum kanningartilfari.

**Krøv til umsøkjaran**
Setanin krevur eina vísindaliga útbúgving á universitetsstøði. Fyrimun hava umsøkjarar við royndum innan nýtslu av teldutøkni í sambandi við loysn av jarðfrøðiligum spurningum, góðum samstarvsevnum og fakligum smidleika.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum avvarandi fakfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Umsókn**
Umsóknir skulu vera Jarðfrøðisavninum í hendi í seinasta lagi 1. februar 2004.

Adressan er:

**Jarðfrøðisavnið**
postsmoga 3169
110 Tórshavn.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Sigurð í Jákupsstovu á tlf. 357000 ella við telduposti til sigurd.i.jakupsstovu@jfs.fo

*Jarðfrøðisavnið er vísindaligur kanningarstovnur undir Oljumálaráðnum. Jarðfrøðisavnið hevur til endamáls at savna, varðveita, handfara og breiða út kunnleika um viðurskifti av týdningi fyri gagnnýtslu og varðveitslu av landsins jarðfrøðiligu náttúruvirðum. Stovnurin skal virka fyri, at løggáva og umsiting av jarðfrøðiligum náttúruvirðum verður grundað á framkomna og dagførda jarðfrøðiliga vitan.*

---



Havnar Fimleikafelag skipar fyri

# RÚTMUKAPPING

## 25. januar 2004

Øll í Føroyum úr 1. flokki og eldri kunnu vera við. Tað skulu verða 4 - 5 luttakarar á hvørjum liði. Liðið ger eina seriu, ið verður dømd av dóm-arum.
Nøkur lið sleppa síðani víðari í finaluna.

Reglur fyri rútmukappingini fáast við at venda sær til **hf@email.fo**
ella við at koma eftir faldara í høllini á Stórheyggi.
Nr. 1, 2 og 3 í hvørjum bólki fáa heiðursmerki.

| | |
|---|---|
| Bólkur 1: | 1. til og við 2. flokk |
| Bólkur 2: | 3. til og við 4. flokk |
| Bólkur 3: | 5. til og við 6. flokk |
| Bólkur 4: | 7. flokkur og eldri |

Tilmeldingarfreist 17. januar 2004

formula.fo stuðlar tiltakinum

---

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Barnaansingin**
Barnaansingin í Tórshavnar kommunu umfatar dagrøktarskipanina, 29 dagstovnar og 10 frítíðarskúlar við tilsamans 1.700 børnum í ansing.

**Býlingshúsið á Ternuryggi**
Á stovninum eru tvær barnagarðsstovur við 20 børnum í hvørjari og ein vøggustova við 12 børnum. Tilsamans 11 starvsfólk eru í býlingshúsinum.

www.torshavn.fo

## Barnaansingin í Tórshavnar kommunu

Tórshavnar kommuna søkir vegna:

**Býlingshúsið á Ternuryggi eftir:**
- einum pedagogi 30 tímar um vikuna til vøggustovuna Smæran.
- einum barnsburðaravloysara 40 tímar um vikuna til barnagarðstovuna Sóljan.

Pedagogstarvið verður sett 1. mars 2004, og starvið sum barnsburðaravloysari verður sett 1. apríl 2004.
Umsókn saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera stovninum í hendi í seinasta lagi mánadagin 26. januar 2004.

Leiðari Heidi Henriksen, tlf. 318626
Turiðargøta 5a,
FO-100 Tórshavn

**Vit ynskja**
at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum. Dentur verður lagdur á, at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og megnar at taka avgerðir í tínum arbeiði.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til stovnsleiðaran ella til Katrina Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60.

---

## Fráboðan um umhvørvis-góðkenning

Við hesum verður gjørt kunnugt, at Heilsufrøðiliga starvsstovan tann 8. januar 2004, við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd og kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 grein 1, stk. 4, hevur góðkent:

**Reinsiverkið hjá Landssjúkrahúsinum**

Góðkenningin liggur alment frammi á Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Avgerðin kann kærast til landsstýrismannin í umhvørvismálum. Møgulig kæra skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Falkavegur 6, 2. hædd, FO-100 Tórshavn, í seinasta lagi fýra vikur frá dags dato.

Góðkenningin kann somuleiðis síggjast á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, www.hfs.fo

**Heilsufrøðiliga starvsstovan**

veitst tú ikki tað?

---

# Avloysari fyri dagrøktara

Dagrøktarskipanin í Klaksvíkar kommunu søkir eftir avloysara fyri dagrøktara í barnsburðarfarloyvi at byrja tann 23. februar 2004.

Vit ynskja, at tú
- hevur hegni og áhuga, at arbeiða við børnum
- kann geva børnunum ein tryggan og fjølbroyttan gerandisdag
- ert fyritakssamur og skapandi
- hevur virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum
- kann samskifta við foreldrini
- ert sinnaður at samstarva við starvsfelagar og sosialu deild.

Í heiminum má vera rúm til børnini at spæla í, og økið við girðing uttanfyri.

Vit kunnu bjóða eitt inspirerandi og lívsjáttandi starv við børnum.

Dagrøktarskipanin er ein stovnur undir sosialu deild hjá Klaksvíkar kommunu. Í skipanini starvast 28 dagrøktarar og 2 námsfrøðingar. Talið av børnum í dagrøkt er 120. Ein fastan dag aðru hvørja viku eru 3 dagrøktarar saman viðbørnum í spælistovuni.
Arbeiðstíðin er ímillum kl. 7.30-17.15. Lønin er sambært sáttmála við Starvsmannafelagið.

Meir fæst at vita við at venda sær til Sigrun Vágstún, dagrøktarleiðara ella Jórun Niclasen, samskipara á telefon 41 00 00.

**Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi í seinsta lagi 28. januar 2004.**

**Klaksvíkar kommuna**
Postboks 2 · 700 Klaksvík

---

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## KUNNGERÐ

Sum kunngjørt av løgmanni verður løgtingsval

týsdagin 20. januar 2004

Valt verður soleiðis:

1. Fólk í Havn, Mjørkadali og Hoyvík, á Hvítanesi og Sundi velja í ítróttarhøllini á Hálsi.
2. Fólk á Argjum velja í róðrarneystinum á Argjum.
3. Fólk í Norðradali og Syðradali velja í skúlanum í Norðradali.
4. Fólk í Kaldbak og Kaldbaksbotni velja í skúlanum í Kaldbak.
5. Fólk í Kollafirði, Oyrareingjum og Signabø velja í kommunuskrivstovuni í Kollafirði.

Atkvøðugreiðslan verður frá kl. 10.00-20.00 ella so leingi, veljarar møta uttan steðg.

Tey, sum fyri sjúku ella øðrum orsøkum ikki kunnu koma á valstaðið, kunnu boða frá á Snarskivuni, tlf. nr. 31.5160, lokal 135, til dagin fyri valið.

Samstundis verður sagt frá, at valkort til løgtingsvalið eru send teimum, ið standa á vallistanum. Um veljari ikki hevur fingið valkort eina viku fyri valið, ella okkurt annað er komið skeivt fyri, skal sum skjótast boðast Snarskivuni frá hesum.

**Valstýrini í Tórshavnar kommunu**

---

# Kunngerð

Atkvøðugreiðslan í Vágs kommunu á løgtingsvalinum týsdagin 20. januar 2004 verður í samkomuhøll skúlans.

Atkvøtt verður frá
**kl. 10.00 til kl. 20.00**
ella so leingi veljarar møta uttan steðg.

Veljarar, íð sambært vallógini lúka treytirnar fyri at nýta brævatkvøðu, kunnu atkvøða á Býráðsskrivstovuni til og við fríggjadagin 16. januar 2004.

Tey, íð vegna sjúku ella vantandi førleika ikki kunnu koma á valstaðið, kunnu velja heima til og við dagin fyri valið, men má boðað verða frá til Býráðsskrivstovuna tlf. 373024 í seinasta lagi fríggjadagin 16. januar 2004 kl. 1600.

Gjørt verður kunnugt, at valkort verða send øllum veljarum, íð standa á vallistanum. Veljari, sum ikki fær valkort, ella fær valkort við villum í, eigur at venda sær til Býráðsskrivstovuna sum skjótast.

*8. januar 2004*
**Valstýrið í Vági**

---

Gluggaglæma
*Faroese Art & Craft*
*www.cfraft.fo*

# Føroyskt handverk og sniðgeving

***Sølyframsýning í Müllers pakkhúsi 30. juni–18. juli 2004***



**Gluggaglæma**
Sølyframsýning við livandi verkstaðum verður aftur í ár í Müllers pakkhúsi við fjølbroyttum handverksgreinum, framførslum og kafé.

Endamálið er at skapa eitt áhugavert søluumhvørvi til teirra, ið ynskja at koma longri á leið við handverkinum enn bert ítriv og dagdvølju.

**Summar og ferðafólk í áhugaverdum umhvørvi**
Á sumri er ferðafólkastreymurin í hæddini. Ein sølyframsýning av hesum slag, er eitt gott høvi hjá ferðafólki at uppliva ein part av føroysku handverksmentanini og at ogna sær lutir, ið umboða gott føroyskt handverk.

**Framsýning í 3 vikur á 5 dagar**
Framsýningin verður í 3 vikur - frá mikudegi til sunnudag, og ymiskir framsýnarar verða hvørja viku. Miðja verður móti at skapa eina so áhugaverda og fjølbroytta framsýning sum gjørligt; tað kann tí gerðast neyðugt at avmarka tilmeldingina innan tær einstøku handverksgreinarnar.

**Sjalskapping**
Triðja vikan verður sermerkt. Í samband við sølyframsýningina verður skipað fyri áhugaverdari kapping um vakrasta, smartasta og snøggasta ***føroyska sjalið anno 2004.***
Innsendu uppskotini verða øll sýnd fram seinastu vikuna í Müllers pakkhúsi. Vinnarar verða kosnir mikudagin 14. juli. *Sí lýsing um kappingina aðrastaðni í blaðnum ídag og á heimasíðuni www.craft.fo*

## Tilmelding: Innan 1. mars 2004

**Tilmeldingarblað** fæst á heimasíðuni www.craft.fo ella við at venda sær til Randi S. Vang, tlf. 514265 / Jónhild Johannessen tlf. 218087

**Luttøkugjald**
Luttøka minst 1 viku: 2500 kr. (5 dagar á 500 kr). Opið: kl. 10 - 20, sunn. 14 – 20.
Íroknað er: framsýningarpláss, borð, stólar, lampur, hillar, beriposar umframt pláss til egna lýsingarsíðu á www.craft.fo (sí dømi á heimasíðuni)
Um lýsing ring tlf. 218087 ella t-post: jonhild@post.olivant.fo

**Verkætlanarleiðarar: Randi S. Vang og Jónhild Johannessen**
FØROYA HEIMAVIRKISFELAG

---




---

## KOYRIKORT TIL PERSÓNBIL

Nýtt skeið byrjar
mikudagin 17. januar kl. 17.30

Tilmelding á tel 31 88 21 · 21 87 77

**Spf. KOYRIKORTIÐ**
v/Hans J. Hermansen · Slættanesgøta 5

Sosialurin 341800

---

## Kranaskeið D

8 – 25 TM

byrjar **mánadagin 12. januar kl. 19.15**

Tilmelding á tel 318821 ella tel 218777

**Spf. KOYRIKORTIÐ**
Slættanesgøta 5 • tel 31 88 21 og tel 21 87 77

Sosialurin 341800